Samuel L. Jackson herjar aftur:

# Ormar umborð

Sean (Nathan Phillips) koyrir motorsúkklu á Hawaii, tá hann sær eitt morð verða framt á ein kendan advokat. Tað er gangstarin Eddie Kim (Byron Lawson), ið fermur hetta dráp. Hann er kendur fyri at selja drøgg, stendur fyri barnaprostitutión og smuglar vápn. Hann er ríkur og ein barónur innan brotsmannaheimin. Sean kann støðga hesum Kim, men brotsmaðurin veit, at Sean sá hetta og vil ger alt fyri at støðga Sean

**UMMÆLI**
*Kim Simonsen*

Tann sterki FBI agenturin Neville Flynn (Samuel L. Jackson) veit, at Sean flíggjar undan Kim og bandanum hjá honum. Hann roynir at hjálpa honum at koma frá Hawaii við at senda eitt privatflogfar avstað, ið skal lokka Kim og bandan at halda at Sean er við umborð, men brotsmennirnir fáa at vita, at hetta er ein fella. Sean fer ístaðin umborð á eitt vanligt charterflogfar til Los Angeles, men hetta fær Eddie Kim at vita, so er fanin leysur.

Kim og teir blaka fleiri hundrað eiturormar umborð á flogfarið. Hetta eru sera óðir ormar, ið er serliga østir.

Umborð fara ormarnir millum skins og hold of gera stóran skaða umborð. Við eitt fáa ferðafólkini úr at gera við at yvirliva

### Ormar og vandi

Tað var ov vandamikið at gera filmin við veruligum eiturormum, so her brúktu tey ístaðin ófarligar ormar, ið royna at líkjast veruligu giftormunum. T.d. líkist Mjólkaormurin frá Brasilia Koralorminum, ið eru sera vandamikil fyri menniskju. Bert djóralæknar duga at síggja mun á hesum.

Samuel J. Jackson er óførur leikari, hann kenna vit frá filmum sum Pulp Fiction, ið gav honum eina oscarnominering í 1994. Hann var eisini við í filminum hjá Spike Lee Jungle Fever frá 1991. Hann hevur seinni verið við í yvir 80 filmum, so sum Star Wars, Kill Bill II, Jackie Brown, Die Hard, True Romance, Godfellas og øðrum.

Hetta er ein vælgjørdur filmur. Ein løgin søga, onkuntið spennandi, men so er alt sakt eisini. Hetta er kanska hin besti filmurin sum er gjørdur um ormar umborð á einum flogfari, men so er ikki meiri at koma aftir.

✱✱✱✱✱✱ (3 av 6)




**Snakes on a Plane**

Leikandi

| | |
|---|---|
| Samuel L. Jackson: | Neville Flynn |
| Nathan Phillips: | Sean Jones |
| Julianna Margulies: | Claire Miller |
| Byron Lawson: | Eddie Kim |
| Leikstjóri: | David R. Ellis |

Frumframsýndur í Havnar Bio
1. september
Loyvdur yvir 15 ár
Longd 1 tíma og 45 minuttir







# 16 Blocks

## – Bruce Willis í essinum

**UMMÆLI**
*Kim Simonsen*

Jack Mosley (Bruce Willis) er ein løgreglumaður í New York. Hann er ein rotin finna í einum kavrotnum samfelagið. Sum allir góðir løgreglumenn, so er hann sjálvandi sera illa nøgdur við tilveruna og hann drekkur tí sum ein svampur.

Jack er ein av hesum deiliga klisjefyltu løgreglumonnunum, ið einki lív hava og halda, at alt er líkamikið. Hann hevur sum allir hinir eitt ringt forhold til allan heimin, serliga til stjóran og familjan er sum oftast langt síðani horvin.

Hetta er góði gamli film-noir klassikarin um hin fordrukna og dekadenta løgreglumannin í stórbýarfrumskóginum, ið tó hevur eitt hjarta tá á stendur.

### 16 blocks

Jack hevur timburmenn, men hendan dagin tá skal hann flyta brotsmannin Eddie Buncker (Mos Def) til Rættin, har hann skal dømast. Teinurin er bert ”16 blocks”, men her byrjar ein øgilig jagstran, tí onkur vil ikki hava at Jack og hesin Buncker koma fram. Jack megnar at bjarga Eddie frá at verða avrættaður mitt á gøtuni. Men vit eitt koma fleiri løgreglufólk, men hesi eri ikki sum tey eiga at vera, tí tey eru undir leiðslu av Frank Nugent (David Morse) og hann vil gera av við Eddie.

Søgan er sum so greið og tað ger einki. Bruce Willis dugir at geva okkum vøruna og filmurin spælir við alt gamaltkent góðs.

Tað hendir ofta ikki so nógv við hesi filmgenruni, bert gerðast special effects flottari. Seinastu árini hava hesir actionleikstjórar roynt at givið genruni eitt vet av humor, so sum í 1980inum og í 1990inum við Bruce Willis, meðan Pierce Brosnan í James Bond virkaði bert meiri og meiri idiotiskur. Filmar sum Die Hard hava gjørt actionfilmin meiri skemtingarsaman og undirhaldandi, meðan kitsjfaktorurin er í topp hjá Steven Segal og Jean Claude Van Damme, ið er fyri fólk sum ikki duga at skriva sítt egna navn.

Actionfilmurin hevur stolið frá kung fu filminum, westernfilminum og filmsøguni, serliga frá film-noir, sum heild, men enn er úrslitið ofta líka so keðiligt og snævurt sum søgurnar eru pappírtunnar. .

Haldi at Bruce Willis er bara finur sum Jack Mosley. Willis er bara fyri kool, líkamikið hvat hann ger, hann hevur verið við í filmum sum ”Pulp Fiction”, ”Twelve Monkeys”, ”The Sixth Sense” og í allari ”Die Hard” triologiini. Hann var við í ”Sin City” , ”Unbreakable”, ”Last Man Standing”, ”Nobody's Fool”, ”The Story of Us”, ”The Fifth Element”, ”The Whole Nine Yards” og sera nógvum øðrum.

Her er alt sum ein vanligur mainstream actionfilmur skal hava, eitt øgiligt tempo og nógvur spenningur. Her er tó eitt sindur ov nógv meiningsleyst prát. Filmurin er sum hann er og vil einki annað enn at undirhalda. Hetta er av og á action av tí betra slaginum, men sum heild er ikki nógv nýtt í hesum filminum.

✱✱✱✱✱✱ (2 av 6)




**16 Blocks**

Leikstjóri Richard Donner.
Leikandi: BRUCE WILLIS, MOS DEF, DAVID MORSE
105 MIN.
Sýndur í Havnar Bio
frá 15. september
Aldursmark 11 ár.